Javnaðarflokkurin umboðaður á námsferð í Íslandi

Í døgunum 3. — 9. august hittust kvinnur innan javnaðarflokkarnar úr Norðurlondum, at umrøða kvinnumál og arbeiði.

Á fyrsta sinni var føroyski javnaðarflokkurin umboðaður í hesum sambandi. Gisleyg Dahl Bonde og Hildubjørg Brattalíð vóru við fyri føroysku javnaðarkvinnurnar.

Evnið var »Kvinnuarbeiði«.

Leikluturin hjá kvinnum í samfelagnum í samfelagnum var viðgjørdur, og hóast umstøðurnar eru ólíkar frá landi til land, so fingu tær kortini innlit í teir trupulleikar, sum mangan eru tær somu og sum eisini bindur kvinnur saman í felagsskap.

Tað er enn soleiðis, at kvinnur í Norðurlondum fáa sær vanligt kvinnuarbeiði, hóast samfelagsbroytingarnar seinastu árini hava verið stórar.

Kvinnur fáa sær frameftir arbeiði innan vanligt kvinnuyrki, t.d. sjúkrasystraútbúgving, læraraútbúgving, eru arbeiðsgentur og reingerðingsfólk.

Spurnartikin var eisini sett við, hví menn flestir eru arbeiðaraleiðarar, teknikarar og eisini í fleirtali, tá tað snýr seg um fakfelagsarbeiði og politiskt arbeiði. Spurnartekin var eisini sett við, at tað sýnist náttúrligt, at menn og kvinnur liva í hvør síni verð.

Á hesum økinum var semja um at arbeiða miðvíst fyri at fáa broyting í.

Kvinnur siga: — Vit eru ikki føddar til slíkan leikpart. Vit krevja líkarætt, møguleikar og skyldur innan yrki og í samfelagnum, sum heild.

Fyri at hesar treytir kunnu uppfyllast, er neyðugt at bróta slóg fyri nýggjum hugsunarhátti og at ávirka skúla og samfelag, at veita ávísum samfelagsmálum innivist, har bæði skúla og samfelag, at veita ávísum samfelagsmálum innivist, har bæði kynini fáa somu undirvísing.


Grundútbúgvingin hjá lærarum eigur at fevna um t.d. heimakunnleika og tekniska undirvísing fyri allar næmingar. Lærubøkur skulu geva vegleiðing, har bæði mans- og kvinnufyribrigdi í gerandisdegnum verða lýst. Eisini er neyðugt at knýta sambandið millum vinnulívið og fólkaskúlan.

At enda verður sagt í skrivi frá umboðunum á norðurlendsku námsferð, at tað er átroðkandi at fáa myndað samfelagið soleiðis, at menn og kvinnur býta sundur millum sín, skyldur og ábyrgd, so fáast kann eitt samfelag, sum gevur javnstøðu og hervið størri livsgóðsku.

Fundirnir í samband við námsferðina vórðu hildnir á skúla við Laugarvatn, uttan fyri Reykjavík.

Gisleyg Dahl Bonde og Hildubjørg Brattalíð siga við Sosialin, at ætlanin er at skipa fyri kvinnuskeiði innan javnaðarflokkin í september mánaða, har møguleiki er fyri at greiða nærri frá ferðini, eins og at leggja viðgjørdu evnini upp til tjak í flokkinum.

Dag.



Á dansiferð í Bulgaria

Í døgunum 13. — 20. august vóru 20 dansarar úr Føroyum í Bulgaria. Ørindi teirra vóru at sýna fram føroyskan dans.

Tað var Mortan Nolsøe úr Havn og Arne Espelund úr Trondheimi í Noregi, sum stóðu fyri ferðini. Ferðaleiðari var Karl Nolsøe.

Arne Espelund er formaður í Trondheim Internationale Folkedanseklub, og hevur serliga áhuga fyri føroyskum dansi, sum norðmenn eisini hava tikið upp eftir okkum. Á vári 1983 var hann í Føroyum og hugdi at føroyskum dansi, eins og hann helt fyrilestur á HF og studentaskúlanum.

Mortan Nolsøe sigur við Sosialin, at Arne Espelund tá bar upp á mál, at skipa fyri dansiferð til Bulgaria, har dansur í-tøkiligur okkara er at finna. Arne Espelund var á studentadøgum sínum eitt hlavt ár í Balkan, so hann tosar flótandi bulgarskt og er væl inni í viðurskiftunum har, sigur Mortan Nolsøe.

Einasta treyt hann setti, var, at dansararnir komu úr somu bygd.

Tí vóru 18 dansarar úr Sumba bidnir um at luttaka. Føroyingarnir dansaðu í Sofia, Smoljan og aðrastaðni.

Í Smoljan var bulgarska sjónvarpið og tók upp sending við føroyskum dansi, sum verður sent í sjónvarpinum. — Serliga áhugavert var at siggja bulgarska dansin, sum er ítøkiligur okkara, sigur Mortan Nolsøe. Teirra grundstig líktust okkara, men bert var dansirætningurin høgru megin í dansiringinum, mótvegis okkara dansi. Bert nýttu bulgarar fylgitónleik til dansin.

Á ferðini tosaði Mortan Nolsøe við dansifrøðingar og granskarar um møguligt samstarv millum londini.

Ferðin kom í lag í samstarv við miðdepilin fyri mentanarvirksemi í Bulgaria.

Dag



Stórt bakkast fyri kvinnufrígerðingina

Á tingfundi, sum var útvarpaður hóskveldið, segði Karin Kjølbro, tá hon takkaði fyri seg á seinastu tingsetuni fyri valið til heystar, at hon takkaði manni, børnum, abbum og ommum fyri, at hon hevði fingið loyvi at rækt sítt starv sum løgtingsumboð fyri tjóðveldisflokkin!

Eftir hesum at døma, so er langt eftir á mál, fyri at kvinnur kunnu kenna tað sum náttúrligt, at arbeiða á jøvnum føti við menn. Hvussu hevði tað ljóðað, um bæði eldri og yngri løgtingsmenn (kallkyn) fóru at takka konum og børnum og øðrum fyri, at teir hava fingið »loyvi« at gera sama arbeiðið?

Øll fólk — óansæð kyn, hava brúk fyri stuðli í gerandisdegnum, tað er millum annað hetta sambandið tú knýtir, tá tú velur at stovna familju. Skulu kvinnurnar — eftir tí Karin sigur — fara at umhugsa slíkt løgtingsarbeiði og um hvat maður og børn fara at siga, o.s.fr. — so er langt eftir á mál, at nakar hættar sær undir slíkt virksemi.

Karin er nærum einasta dømi vit hava, og hon stuðlar ikki kvinnuligum møguligum evnum at royna seg, tá hon frá løgtingsins røðarapalli útvarpar síni persónligu viðurskifti. Var tað fyri at skapa vælvilja millum mannligu veljararnar, so var tað til at skilja, men er tað nú rætta leiðin at ganga, um kvinnur skulu fáa innivist á tingi?

Dagny Joensen

Vit práta og tekna

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út tríggjar skúlabøkur, sum Hallgerð Hansen, lærari, hevur skrivað.

Hetta er serligt undirvísingartilfar til føroysk skriving og lesing, ætlað til børn í 1. flokki.

Umframt undirvísingartilfar á byrjunnarstigi, so kann hetta eisini nýtast til serundirvísing. Hallgerð Hansen, er lærari í Vestmanna, og hevur hon tillagað tilfarið til føroysk viðurskifti.

Bøkurnar eru ætlaðar børnum ta fyrstu tíðina í skúlanum, og eru eisini hentar hjá lærarunum at fáa eina hóming av, hvussu búgvið barnið er handaliga, málsliga at fara at lesa.

Her verður bert prátað, teknað og lurtað eftir ljóðum. Somuleiðis verður eisini sungið og spælt, eins og myndirnar í bókini kunnu geva barninum betri møguleika at skilja mannagongdina, tá tey skulu læra at lesa og skriva. Bøkurnar eru eisini góðar á tann hátt, at undirvísingin kann fara fram í spølni, eins og børnini fáa møguleika at gera annað enn at sita still og lurta. Tað er sum kunnugt ofta torført hjá smærri børnum.

Bøkurnar kosta: Vit práta og tekna 2, 40 kr., Vit práta og tekna 3, 56 kr., Arbeiðsbók til Vit práta og tekna 1—3, 56 kr.

DAG.

Skúlablaðið

Skúlablaðið hesaferð hevur í innihaldi greinar, sum sjálvsagt hava við fólkaskúlan at gera. Marita Petersen skrivar frágreiðing frá aðalfundinum í Lærarafelagnum, Jógvan Jespersen um samstarv millum donsku og føroysku Lærarafeløgini, eins og grein um menning innan Fólkaskúlan og serlæraraviðkanina innan tvey ár. Ein grein eru ráðgeving í ungdóms- og útbúgvingarspurninginum, ein um finska læraraverkfallið. Pauli Nielsen skrivar um limaskapin innan NLS og Maja sørensen skrivar um sjónleik og Steinerpedagogikk. Her er eisini umrøtt vitjanin úr Íslandi, tá evnaveik framførdu sjónleikin »Livsmyndir« í ár á Læraraskúlanum.

Elsa Birgitta Egholm skrivar um viðurskiftini at virka sum prógdómari og hvat hon kundi hugsað sær øðrvísi í prógvuppgávunum, og Bjørg Matras Jensen skrivar um skúlabókasavnið.

Dag.